

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Trygvi vann í fyrstu royndini

**HONDBÓLTUR** Trygvi Mortensen stóð fyri fyrstu ferð á odda fyri besta kvinnuliðnum hjá Tjaldrinum í gjár. Venjaraskiftið riggaði væl í fyrstu royndini

Uni Holm Johannesen

Tað vísti seg, at venjaraskiftið hjá Tjaldrinum riggað væl í fyrsta umfari.

Bogdan Burcea varð sendur til hús fyri 10 døgum síðan, og Trygvi Mortensen loysti hann av.

Mortensen hevur roynt at gjørt sína ávirkan galdandi undir venjing í seinastu viku.

Tjaldrið reisti seg av álvara aftur aftaná javnleikin á heimavølli móti StíF, sum er aftast.

Tjaldrið vann týdningarmikla oddadystin móti Neistanum. Tí kundu Trygvi Mortensen og nevndin í felagnum næstan ikki ynskt sær betri byrjan við samstarvinum.

### Byrjaðu væl

Tjaldrið legði bradligari fyri. Aftaná átta minuttir var heimaliðið á odda 5-0.

Barbara Brauer gekk aftur á odda hjá Neistanum. Hon var eydsýnd fyrstu løtuna, men Tjaldrið fekk tamarhald á henni við tíðini.

Tað merkist, at Katrin á Neystabø og Marjun Danberg, Neistin, vóru kki við. Tær eru uttanlands. Tá Brauer fekk lítið av plássi, tók eingin av hinum ábyrgd, sum Katrin á Neysatbø og Marjun Danberg hava í øðrum dystum.

Simona Petersen var serliga væl uppløgd í gjár. Hon var ein støðug hóttan í álopsspælinum, og hon skeyt sjey av málunum hjá heimaliðnum.

Gurðun í Lágabø, sum vardi málið hjá Tjaldrinum, stóð seg eisini sera væl. Tað var takkað verið hennara avriki, at kvinnurnar úr Runavík vunnu sær eina trygga leiðslu beinanvegin.

Neistin royndi at hótta, og einu løtuna vóru bara tvey mál á muni. Nærri komu gestirnir úr høvuðsstaðnum ikki.

### Javnt í oddinum

Spurningurin er í løtuni, um tað verður Neistin ella TJaldrið, sum skal spæla finalurnar um føroyameistaraheitið móti Stjørnuni.

Neistin er tvey stig framman fyri kvinnurnar úr Runavík í løtuni, sum hava spælt ein dyst færri.

Tjaldrið spælir móti VB á útivølli næsta vikuskifti. Tá hevur Neistin frí. Blálittu kvinnurnar úr Havn spæla aftur 1. desember, tá tær vitja VÍF.

*uni@sosialurin.fo*

# Stjørnan greiddi sína skyldu

**HONDBÓLTUR** Stjørnan reisti seg aftur, aftaná tapið fyri Neistanum týskvøldið. Greipuvinnararnir vunnu sannførandi á VB tá avtornaði

Uni Holm Johannesen

Tað var seinasta korterið av dystinum, at Stjørnan setti ferðina upp.

Heimaliðið var á odda allatíðina, men gestirnir úr Vági runnu beint í hølunum.

Norðlýsið skrivar á sínari heimasíðu, at tað var ikki, at »VB spældi serliga væl, at stóran part av dystinum móti Stjørnuni, vóru væl við. Tað var meira av minni góðum spæli frá heimaliðnum, at ein ávísur spenningur var í dystinum.«

### Umráðandi sigur

Stjørnan fekk staðfest týskvøldið í farnu viku, at tær noyðast at kýta seg, um tær skulu endurvinna føroyameistaraheitið.

Kvinnurnar úr Klaksvík taptu fyrsta landskappingardystin í ár, tá tær vitjaðu Neistan.

Tí var umráðandi hjá Svein Rógva Nielsen og leikarunum at reisa seg skjótast gjørligt. Og tað eydnaðist.

Tað var hinvegin ikki serliga sannførandi. Heimaliðið fór ongantíð undan VB, fyrr enn orkan gekk undan hjá gestunum.

Seks mál skiltu liðini, tá dysturin var liðugur. Úrslitið var 34-28.

*uni@sosialurin.fo*

# Kyndil nærkast ovastu liðunum



*Mynd: Álvur Haraldsen*

**HONDBÓLTUR** Kyndil vann uppiborið, tá VÍF vitjaði í gjár. Tað var seinastu løtuna av dystinum, at heimaliðið fór frá

Uni Holm Johannesen

Kyndil legði bradliga fyri og vann sær eina trygga leiðslu beinanvegin.

Kvinnurnar úr Vestmanna stríddust væl og komu eitt skifti á javnt, men so hóttu gestirnir ikki aftur.

Kyndil var á odda 13-9 í hálvleikinum, og aftaná hvíldina øktist munurin bara millum liðini.

Heimaliðið vann uppborið og staðfesti, at tær fara ikki at stríðast millum niðastu liðini í hesum kappingarárinum.

Kyndil vitjar StíF næsta vikuskiftið. StíF hevur bara fingið eitt stig higartil, og grønulittu kvinnurnar úr høvuðsstaðnum er tískil favorittar at vinna dystin.

Eydnast tað, so bjóðar Kyndil bæði Tjaldrinum og Neistanum av í stríðnum um finaluplássið.

*uni@sosialurin.fo*

## ATLANTIC AIRWAYS DEILDIN:

### Kyndil – VÍF 27-18 (13-9)

Dómarar: Heri Petersen og Dánjal Samuelsen

**10 min.: 5-4**
**20 min.: 9-7**
**40 min.: 18-13**
**50 min.: 22-13**

**Kyndil:** Randi Wardum 6, Heidi Maria Akselsen 5, Anja Heinadóttir 4, Súsanna Petersen 3, Gurið Eystberg 3, Rannvá Carlson 2, Turið Arge 2, Jórun Ludvig 1, Anna Brimnes 1.
**VÍF:** Liljan Djurhuus 8, Agnas Olsen 3, Elisa Leo 2, Annika Poulsen 2, Torgunn Johansen 1, Rakul Joensen 1, Tóra Seloy 1.
Útvísingar: Kyndil 4 – VÍF 4
Áskoðarar 165

### Stjørnan – VB 34-28 (15-13)

Dómarar: Magnus í Króki og Thomas Juul Thomsen

**10 min.: 3-3**
**20 min.: 9-7**
**40 min.: 21-18**
**50 min.: 28-19**

**Stjørnan:** Valentina Suciu 9, Nicoletta R. Hansen 7, Durita Ljósstein 5, Una Olsen 4, Anna Kristina Samson 3, Bára S. Klakstein 2, Annika Ljósstein 1, Durita Christophersen 1, Edith Hansen 1, Durita Mikkelsen 1.
**VB:** Gintare Lydekaite 8, Svava Vestergaard 5, Gurið Mortensen 4, Bára Mortensen 3, Una Egilsdóttir 3, Justina Balzarvicuite 2, Monika Samuelsen 2.
Útvísingar: Stjørnan 3 – VB 4

***Tað eydnaðist ikki at fáa dómaraseðilin frá dystinum millum Tjaldrið og Neistan***

## Sunset Deildin *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 8 | 240 | 193 | 47 | 14 |
| 2 | Neistin | 8 | 222 | 202 | 20 | 11 |
| 3 | Tjaldur | 7 | 195 | 162 | 33 | 9 |
| 4 | Kyndil | 8 | 198 | 181 | 17 | 8 |
| 5 | VB | 8 | 203 | 215 | -12 | 7 |
| 6 | VÍF | 8 | 192 | 228 | -36 | 4 |
| 7 | StíF | 7 | 139 | 208 | -69 | 1 |